




*Arne Winthereig formaður í Unga Sambandi, sum viðmælir at Rúsan hevur opið leygardagar*

## Fert tú í Rúsuna leygardagin?

- Ja, um tað verður opið, so kann tað væl verða.

**HVÍ SKAL RÚSAN HAVA OPIÐ LEYGARDAG?**

- Hví ikki? Spurningurin er, hví tey, sum ikki ganga í Rúsuna, skulu bestemma, nær tey, sum ganga í Rúsuna, kunnu fara í Rúsuna. Hetta snýr seg um at hava frælsi at velja, og um at ein minniluti við sterkari trúgv ella trupulleikum ikki skal forða einum meiriluta í at gera nakað.

**SKAL RÚSAN HAVA OPIÐ SUNNUDAG?**

- Um tað er tørvur á tí, so er tað í lagi fyri mítt viðkomandi.

**TIT SIGA, AT UPPLATINGARTÍÐIRNAR HJÁ RÚSUNI KUNNU VAKSA UM TRIVNAÐIN HJÁ UNGDÓMINUM. HVUSSU HONGUR TAÐ SAMAN?**

- Um ungfólk fáa frælsi at velja tað, sum tey ynskja, so økir tað um trivnaðin. Í hesum føri eiga tey at sleppa í Rúsuna at keypa rúsdrekka leygardag, um tey vilja tað.

**HVØNN FRÍAN MØGULEIKA SAKNAR TÚ Í FØROYUM?**

- At fólk kunnu fara á náttklubba, tá tey hava tørv á tí, og at ein gomul Halgidagslóg ikki forðar teimum.

# Kulur




Vaksandi talið av russiskum kavbátum undir Føroyum órógvar ikki uttanríkismálaráðharran

## Í MORGIN




Eitt lot av vesturi og útnyrðingi, út á kvøldið og um náttini fleyr av ymsum ættum, seinni av útsynningi og suðuri. Fyrrapartin ælaveður, men annars turt og sólglottar. Hitini millum fimm og níggju stig.

## Í MORGIN




Lot til andøvsgul av suðuri, um kvøldið veksur vindurin til gul til stívt andøvsgul. Skýggjað veður, út á seinnapartin fer at regna. Leygarnáttina veksur vindurin til andøvsgul til strúk í vindi av suðuri og útsynningi. Hitin alt samdøgrið millum fimm og níggju stig.

## Í MORGIN




Andøvsgul til strúk í vindi av suðuri og útsynningi. Fyrrapartin regnar eitt sindur, men seinni verður turt og sólglottar, og sunnunáttina klárt veður. Hitin millum fimm og tíggju stig.

## LUFTTRÝSTIÐ









**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 1 | Tromsø | 0 | Moskva | 10 | Athen | 19 |
| Reykjavík | -1 | Bergen | 2 | Berlin | -- | Beijing | 15 |
| Tórshavn | 7 | Oslo | 1 | Paris | 13 | New Dehli | 33 |
| Lerwick | 4 | Stokkhólm | 5 | Madrid | 10 | Bangkok | 35 |
| Aberdeen | 2 | Keypmannah. | 9 | Róm | 17 | Sydney | -- |
| London | 10 | Helsinki | 2 | Malorca | 18 | New York | 6 |

## VESTFALLSKYRRINDI

28. mars — Mánin næstur jørðini
6. apríl — Seinna kvarter
9. apríl — Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. apr | 02:29 | 15:06 | 01:29 | 14:06 | 01:44 | 14:21 | 04:29 | 17:06 | 05:29 | 18:06 | 00:44 | 13:21 | - | 12:21 | 02:44 | 15:21 | 03:44 | 16:21 | 02:14 | 14:51 | 03:29 | 16:06 |
| 8. apr | 03:27 | 15:49 | 02:27 | 14:49 | 02:42 | 15:04 | 05:27 | 17:49 | 06:27 | 18:49 | 01:42 | 14:04 | 00:42 | 13:04 | 03:42 | 16:04 | 04:42 | 17:04 | 03:12 | 15:34 | 04:27 | 16:49 |
| 9. apr | 04:09 | 16:29 | 03:09 | 15:29 | 03:24 | 15:44 | 06:09 | 18:29 | 07:09 | 19:29 | 02:24 | 14:44 | 01:24 | 13:44 | 04:24 | 16:44 | 05:24 | 17:44 | 03:54 | 16:14 | 05:09 | 17:29 |
| 10. apr | 04:47 | 17:05 | 03:47 | 16:05 | 04:02 | 16:20 | 06:47 | 19:05 | 07:47 | 20:05 | 03:02 | 15:20 | 02:02 | 14:20 | 05:02 | 17:20 | 06:02 | 18:20 | 04:32 | 16:50 | 05:47 | 18:05 |
| 11. apr | 05:22 | 17:39 | 04:22 | 16:39 | 04:37 | 16:54 | 07:22 | 19:39 | 08:22 | 20:39 | 03:37 | 15:54 | 02:37 | 14:54 | 05:37 | 17:54 | 06:37 | 18:54 | 05:07 | 17:24 | 06:22 | 18:39 |